VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til grein um Mentanarhúsið

**Vegna tað at nakrar, heldur óhepnar orðingar, komu fyri í greinini, ið var at lesa í Dimmalætting 1. september 2005, undir heitinum Øll uppsøgd í Mentanarhúsinum. Vil eg hervið koma nakrar rættingar**

**Vegna nevndina**
*Per Christensen, formaður*

Nevndin og leiðarin av Mentanarhúsinum hava leingi viðgjørt tí skeivu gongdina í rakstrinum av Mentanarhúsinum. Fyrst í august avgjørdu nevnd og leiðarin (Sólarn Solmunde), at siga samstarvið upp teirra millum. Samstundis, var avgjørt at hini, ið høvdu føst størv í húsinum, eisini skuldu sigast upp. Hetta vóru tvey _ tíðar størv, eitt sum hjálparfólk og eitt sum bókhaldari. Húsavørðurin hevði sagt seg úr starvinum nakað áðrenn hendan avgerð var tikin.

Samstarvið millum leiðarin og Fuglafjarðar Sjónleikarafelag heldur uppat frá 1. oktobur 2005.

Eisini kom tað skeivt fyri viðvíkjandi Norðurlandahúsinum. Norðurlandahúsið fær sjálvandi ikki stuðul úr Mentamálaráðnum, men úr Norðurlandaráðnum. Eisini er Norðurlandahúsið ikki beinleiðis kappingarneyti hjá Mentanarhúsinum, men verður Mentanarhúsið oftani samanborið við NLH, og er hetta eftir mínum tykki óheppið, tá ið NLH fær stóran stuðul útgoldnan fyri sítt virksemið, meðan Mentanarhúsið noyðist at virka útfrá vinnuligum fortreytum.

Toll- og Skatt ger eisini sítt arbeiði, her er tað sjálvandi lógarkarmurin, ið er heldur stirvin og ikki tekur hædd fyri hvørt virksemi er reint vinnuligt ella mentanarligt

Annars heldur virksemið fram í Mentanarhúsinum, eitt nú ávirka hesar broytingar ikki tiltakið við Car Park North, ið verður í Mentanarhúsinum 24. september 2005. Vantandi skipar Mentanarhúsið ikki fyri so nógvum tiltøkum framyvir, men verður húsið meira útleiga til ymiskt mentanarligt virksemi.

# Góðir karmar til nýggjar fyritøkur

**Vágur:** Tey, sum hava hug at seta á stovn egið virki í Vágs kommunu kunnu nú fáa serstakan stuðul til hetta.

Frá 1. januar komandi ár verður nevniliga gjørligt at fáa ráðgeving til hesa ætlanina, eins og eitt lítið fíggjarligt ískoyti verður givið til keyp av slíkari ráðgeving.

Lagt er upp til, at hesin stuðulin skal vera umleið 5000 kr. Og á býráðsfundi í Vági týskvøldið varð hetta eisini samtykt. Tó fer viðgerðin av fíggjarætlanini fyri 2006 at taka endaliga støðu til, hvør upphædd ið latast skal.

Fleiri viðurskifti skulu fáast í rættlag, áðrenn skipanin kann setast í verk, m.a. skal Innlendismálaráðið góðkenna hana. Fyrireikarnir hava kortini fingið at vita, at skipanin ikki er í mótstríði við kommunulógina, skrivar heimasíðan hjá Suðurrás.



*Góðir karmar verða nú skaptir fyri tey, ið hava hug at seta virki á stovn í Vági*

*(savnsmynd)*

Henda ætlanin er ein partur av Visjón 2010, sum er ein ætlan um at menna og skapa framburð í Vági. Og nú hevur so býráðið eisini skapt ein hepnan møguleika hjá ígongdsetarum.

Henda skipanin við stuðli til ígongdseting av vinnuligum virksemi kemur at virka soleiðis, at hesi fólkini venda sær til kommununa í Vági. Hagani fáa tey stuðul, soleiðis at tey rinda ráðgevingartímar hjá vinnuráðgevum, grannskoðara, sakførara og øðrum sakkønum fólki.

**sb.**

# Kyn og harðskapur

**Evnisdagur verður í Norðurlandahúsinum 5. september 2005 um norðurlendska harðskapsgransking**

EVNISDAGUR
*Norðurlandaráðið í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya*

Seinastu fimm árini hevur Norðurlandaráðið stuðlað eini stórari granskingarverkætlan við heitinum Kyn og harðskapur. Endamálið við verkætlanini varð at varpa ljós á harðskap í mentunarligum høpi, við serligum atliti til harðskap kynjanna millum.

Nú verkætlanini er liðug, hevur Norðurlandaráðið gjørt av at kunnast skal um úrslitini. Fyrsta tiltakið var ein stór ráðstevna, sum var í Gøteborg í summar. Harafturat hevur Ráðið gjørt av, at úrslitini skulu kunnast í øllum Norðanlondunum. Kunningin í Føroyum verður á evnisdegi, sum verður í Norðurlandahúsinum um mánadagin 5. september. Við á fundinum vera millum annað umboð fyri løgregluna, Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, sum hevur umboðað Føroyar í stýrisbólkinum og Katrine Sidenius, sum er yvirlækni á nýggju miðstøðini fyri neyðtøkuoffur á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Evnisdagurin vendir sær serliga til fakfólk innan heilsu-, sosial- og skúlaverkið, løgregluna, politikarar og fjølmiðlar, men øll, sum hava áhuga fyri evninum, eru hjartaliga vælkomin í Norðurlandahúsið. Tað kostar einki at vera við á evnisdegnum. Eyðun Joensen og Fróðskaparsetrið skipa fyri evnisdegnum.

**Skráin á evnisdegnum er henda:**

9.00-9.25 Eyðun Joensen, psykologur vegna stýrisbólkin:
Kunning um ráðstevnudagin og granskingarverkið hjá NorFa/Norðurlendska Ráðharrastovninum um "Kön och Våld" ,"Gender & Violence" 2000-2005.

9.30-9.50 Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil., Fróðskaparsetur Føroya:
Harðskapur lýstur í føroyskum bókmentum

9.55-10.15 Eyðun Andreassen, professari, dr.phil, Fróðskaparsetur Føroya:
Harðskapur lýstur í sagnum og kvæðum

10.15-10.45 Kaffi og te

10.45-11.20 Jens Jensen & Hildur Hentze, Løgreglan:
Um harðskap og harðskapsfyribyrging í løgregluarbeiðinum

11.25-12.00 Elin R. Planck, leiðari fyri Kvinnuhúsið:
Royndirnar frá arbeiðinum í Kvinnuhúsinum

12.00-13.00 Steðgur

13.00-14.00 Katrine Sidenius, yvirlækni á Rigshospitalets Center for Voldtægtsofre:
Royndirnar frá arbeiðinum á Ríkissjúkrahúsinum og um nakrar av granskingarverkætlanunum

14.00-15.15
Panelorðaskifti, har høvi verður hjá áhoyrarum at viðmerkja, spyrja og fáa svar

15.15-15.30 Eyðun Joensen frá stýrisbólkinum fyri granskingarverkætlanina:
Samandráttur og niðurstøða

Orðstýrari: Helena Dam á Neystabø

Ókeypis luttøka eins og høvið verður hjá fólki ókeypis at ogna sær ymsar granskingarfrágreiðingar um harðskap v.m.

# Hundar skulu eisini klippast

**Hundaskeið:** Nýstovnaða hundafelagið fer nú til verka við sínum fyrsta skeiði fyri limirnar.

Í dag kl. 14 verður fyrsta skeiðið hjá felagnum hildið. Hetta er eitt skeið í vanligari hundarøkt, sum verður hildið í Skansastovu í Havn.

Ein partur av skeiðnum er um klipping av hundi, har fólk ofta lata hundin doyva hjá djóralækna og síðani sjálvi trimma hundin. Úrslitið er mangan hareftir, men nú verður so møguleiki at fáa kunnleika um, hvussu ein trimmar hundin, hvussu ein bustar tenn hansara og hvussu ein reinsar eyguni og oyruni.

Samstundis við skeiðið er eisini gjørligt at melda seg sum lim í Hundaeigarafelagnum. Sum skilst hevur gingið væl við at fáa fólk at tekna seg sum limir. Í dag eru sostatt omanfyri 40 fólk limir í felagnum.

**sb.**

# Virkishús til tey ungu

**Klaksvík:** Nú skal leiðari finnast til nýggja virkishúsið fyri ung, sum kommunan í Klaksvík ætlar sær undir. Sum skilst, so skal virksemið minna nakað um tað, sum gjørt verður í og út frá Margarinfabrikkini í Havn.

Í lýsing í Norðlýsinum í gjár verður sagt, at leiðarin skal skapa møguleikar hjá børnum og ungum fyri mennandi upplivingum í einum rúsfríum umhvørvi. Viðkomandi skal eisini samstarva við feløg og einstaklingar um felags mál.



*Klaksvíkingar fáa nú sítt virkishús fyri ung, sum fer at virka eftir nøkurlunda sama leisti sum Margarinfabrikkin í Hav*

Nýggi leiðarin skal vera pedagogur, lærari ella hava aðra viðkomandi útbúgving, og fær haraftrat ta spennandi uppgávuna at byggja upp henda stovnin frá grundini av.

Sum skilst, so fer hetta virkishúsið at halda til í húsunum har Sjóvinnubankin helt til í sínari tíð.

**sb.**